# Gravgangur eftir føroysku gentunum

*Stóru altjóða modelstovurnar nærum detta um hvørja aðra í jagstranini eftir føroysku gentunum, sum júst eru afturkomnar úr New York*



*Óluvá Johannessen er ein av føroysku gentunum, sum júst er afturkomin úr New York. Síðani luttøkuna á stóru framsýningini í New York, hava samrøðurnar við ymsu modelstovurnar verið nógvar í tali*

JÁKUP MØRK

Ofta hevur verið tikið til, at føroysku genturnar eru millum vakrastu sprundini í heiminum. Onkur hevur kanska hildið, at hetta at kallað bert hevur verið eitt slag av tjóðskaparkenslu, men nú tykist vera staðfest, at tað veruliga er nakað um tosið.

Fyri stuttum fóru 11 føroyskar gentur av landinum við kós móti stóra súreplinum, New York. Endamálið við túrinum var luttøka á eini risastórari modelframsýning, har stóru altjóða modelstovurnar eisini eru umboðaðar.

**Gekk framúr**

Tilsamans vóru eini 2.000 ungfólk við á framsýningini, og vórðu hesi so aftur býtt í smærri bólkar, alt eftir stødd og aldri.

Hóast stóra luttakaratalið, so smæddust føroysku genturnar ikki burtur á nakran hátt. Gissur Patursson, sum hevur við gentunum á ferðini sigur frá, at føroysku genturnar høvdu ikki færri enn 35 steyp og heiðursmerki við sær, nú tær komu heim aftur, og at hetta var nógv tað mesta, sammett við støddina av landinum.

Gissur letur annars sera væl at ferðini. Einki klandur ella rok hevur verið hesar báðar vikurnar, og sjálvur hevði hann hug at samanbera bólkin við væl samanspælt hondbóltslið, har alt svingar, sum tað skal.

Vinningarnir, sum genturnar fingu, vóru innan øll sløg av framsýningum, eins og teir vóru spjaddi yvir fleiri av ymsu bólkunum. Tað tóktist nærum, sum var tað líkamikið, hvat føroysku diddurnar tókust við. Myndatøku, sjónvarpsupptøkur, Catwalk ella sangur, føroysku genturnar vóru frammalaga í øllum, og sum sagt, so sýndu dómararnir teimum stóran ans, tá stigini skuldu latast fyri avrik teirra.

Eitt er, at dómararnir á framsýningini sýndu føroysku gentunum stóran ans, men stóru modelstovurnar raknaðu so sanniliga eisini við.

**Innbjóðingar í hópatali**

Eftir framsýningina høvdu modellstovurnar nevnliga høvi til at seta seg í samband við ymsu modellini, har tey so fingu høvi til at hyggja nærri at teimum, eins og onkur eisini varð biðin um at koma til samrøðu.

Óluvá Johannessen, sum er ein av føroysku modellunum, sigur við Sosialin, at tær frammanundan fingu at vita, at um eini 8 samrøðu komu upp á tal, varð hetta at meta sum sera gott. Tá tað so verður lagt afturat, at fleiri í føroyska bólkinum fingu fimtan, tjúgu og tredivu innbjóðingar, er einki at siga til, at føroyska luttøkan hevur verið tað, tey rópa ein rimmar succes. Sum skilst, so vóru hinir luttakararnir á sýningi eisini ovfarnir av, hvussu óðir sonevndu »head-hunters« vóru eftir diddunum úr Atlantshavinum.

Fyri nøkrum mánaðum síðani høvdu vit her í blaðnum samrøðu við Óluvá. Hon greiddi tá frá, at hon sum so ikki væntaði sær nakað av ferðini, men at hon bert tók hetta sum eina stóra uppliving.

Nú er í øllum førum staðfest, at ferðin verið ein risastór uppliving, bæði fyri Óluvá og hinar genturnar. Modellstovu sum Eileen Ford og Elite Models ljóða kanska forkunnugt og veruleikafjart í okkara oyrum, men hesar vóru sjálvandi eisini millum hyggjararnar, sum á sýningini royndu at fáa fatur á nýggjum andlitum til komandi uppgávur. Ikki er tó líkt til, at Óluvá hevur mist sambandi við jarðarflatuna, nú hon er komin aftur í heimliga umhvørvið. Tá vit hittu hana á málið, var tað júst hin sama jarðbundna gentan, sum vit tosaðu við fyri hálvum ári síðani, og hetta man helst eisini vera ein góður eginleiki, skuldi tað borið soleiðis á, at hon í framtíðini skal út um landoddarnar at royna seg.

Tað er gjøgnum Icelandic Models, at luttøkan hjá føroysku gentunum er fingin í lag, og stjórin hjá hesum, Kollbrún Aðalsteinsdóttir, sigur við Sosialin, at telefonin so at siga hevur gingið heit síðani framsýningina. Allar tær stóru modelstovurnar vilja hava fatur á føroysku gentunum, og hóast einki enn er endaliga avgjørt, so ljóðar tað als ikki óhugsandi, at onkrar av hesum eisini fáa møguleikan at royna seg úti í stóru verð.

## Norðoyastevnufundur í kvøld



Í kvøld, mikuvøldið klokkan 19.00, verður Norðoyastevnufundur í Býráðshøllini í Klaksvík. Øll ítróttarfeløg, frítíðarfeløg og einstaklingar, sum eru áhugað at gera Norðoyastevnuna 2000 so fjølbroytta sum møguligt eru vælkomin.

Norðoya Frítíðar og Ítróttarráð hevur fastlagt, at stevnan verður í døgunum frá 1. Juni til 6. Juni, tað vil siga, at stevnan verður tveir dagar longri enn vanligt.

Á norðoyastevnuni 1999 stóð NFÍ fyri øllum tiltøkunum á stevnuni, og sum heild eydnaðist stevnan stak væl, og nú stevnan verður tveir dagar longri, er ætlanin, at gera Norðoyastevnuna 2000 enn betur og fjølbroyttari enn 1999, og til tað krevst, at nógv feløg og einstaklingar møta upp til fundin í kvøld kl. 19.00, sigur NFÍ.

## Leiðandi spurningar

Av tí at villa var komin í tekstin til tekningina hjá Óla P í blaðnum í gjár, prenta vit tekningina umaftur




**»Rullandi redaktiónin «á Sosialinum spyr, sum hon vil hava svar**



# Norðoya Sparikassi hevði stórt avlop

*Annað árið á rað hevði Norðoya Sparikassi metstórt avlop. Á aðalfundinum fríggjakvøldið fóru stjórin og formaðurin fyri umsjónarráðið frá*

EYÐUN KLAKSTEIN

Norðoya Sparikassa kom inn nýggju øldina við einum sera góðum úrslitið.

Í 1999 var avlopið hjá sparikassanum í Norðoyggjum metstórt – annað árið á rað. 18,1 milliónir lógu eftir av vanliga rakstrinum. Í 1998 var avlopið 16,5 milliónir krónur.

Netto rentuinntøkurnar vuksu úr 37,1 milliónum í 1998 til 39,2 milliónir í 1999. Hetta var tí, at útlánini í fjør øktust, samstundis sum árið var merkt av rentuhækking.

Útlánini vuksu við 100 milliónum í fjør, meðan innlánini vuksu við 9 milliónum. Hetta ger, at gjaldføri hjá Norðoya Sparikassa er fallandi, men tað er framvegis gott.

**Útskiftingar**

Gjaldførið er nú 78,5% av stuttfreistaðu skyldum Sparikassans. Lógin krevur 15%.

Eginpeningurin vaks við 16,5 milliónum og er nú 167 milliónir krónur.

Á aðalfundinum, sum var fríggjakvøldið, fór stjórin Norðoya Sparikassa, Jóannes Poulsen, frá. Nýggjur stjóri er 33 ára gamli Eyðfinn Reyðberg, sum júst hevur verið í Danmark og tikið HD. Hann starvaðist frammanundan í sparikassanum í 12 ár.

Eisini formaðurin fyri umsjónarráðið, Jógvan Elias Joensen, fór úr sínum sessi. Hann valdi at taka seg aftur fyri aldur, og nýggjur maður í hansara sessi verður Óli Marner Christiansen, sum er 40 ára gamal.



*Nýggjur stjóri er 33 ára gamli Eyðfinn Reyðberg, sum júst hevur verið í Danmark og tikið HD*

## Eru nú farnir undir at gera áskoðaraskýli

Nú er arbeiðið at gera áskoðaraskýlið við vøllin í Klaksvík umsíðir farið í gongd.

Tosað hevur verið um at gera nýtt skýlið, síðani tað gamla fór í eini ódn seint í 80'unum. Fleiri ferðir hava ítøkiligar ætlanir verið á borðinum, men ikki fyrr enn nú er álvari gjørt av hesum ætlanum.

Leingi var ósemja um, hvørju megin vøllin skýlið skuldi verið, men nú er nakað síðani, at avgerðin varð tikin um, at nýggja skýlið skal vera á sama staði, sum tað gamla stóð.

Verkæltanin, sum umfatar 650 áskoðarapláss, almenn toilett og serliga pláss til rørslutarna, kostar 3,5 milliónir.

Klaksvíkar kommuna hevur gjørt sáttmála við Pól Kristoffur Joensen, sum skal gera skýlið. Arbeiðið er farið í gongd, og ætlanin er, at skýlið skal standa liðugt um miðjan august.



**Møguligt at byggja út**

Tað eru Klaksvíkar kommuna, Føroya Landsstýrið, KÍ, NFÍ og Áskoðarafelagið hjá KÍ, sum standa fyri fíggingini av skýlinum.

Skýlið verður gjørt soleiðis, at møguligt verður at byggja út, um onkur av teimum, sum fíggja skýlið, hava áhugað í at fáa sær høli í skýlinum.

Verkæltanin var fyrr í ár munandi størri, men neyðugt hevur verið at skorið av verkætlanini, so hon samsvarar betur við fíggjarligu orkuna hjá kommununi.

Skýlið kemur at standa tætt við vøllin, og tað er stutt frá vøllinum og upp á fyrstu áskoðaraplássini. Hetta verður gjørt fyri at varðveita tættleikan millum vøllin og áskoðararnar.

**ek**

## Allir taka ómaksgjøld

Tað nyttar einki at skifta peningastovn fyri at sleppa undan ómaksgjøldum í sambandi við flytingar.

Føroya Banki og Føroya Sparikassi hava fyri tíð síðani boðað frá, at teir fara at taka hesi gjøld.

Og eisini Norðoya Sparikassi, sum hevði aðalfund um vikuskiftið, fer í framtíðini at taka ómaksgjøld frá viðskiftafólki, tá tey skulu gera bankaflytingar.

Ætlanin hjá peningastovnunum er at sleppa undan einum parti av hesum arbeiði, tí væntandi er, at fleiri viðskiftafólk fara at brúka heimabankan og gera flytingar av síni egnu teldu, tá bankarnir fara at taka gjøldini.

Vit hava eisini skilt á langum, at nógv fólk hava skrásett seg sum brúkara av heimabankanum, eftir at tað kom fram, at gjøld verða løgd á bankaflytingar framyvir.

**ek**

## Miss Linda og Hjarnar undirhalda

Leygarkvøldið verður dansur í ítróttarhøllini í Runavík.

Føroyski rockbólkurin, Hjarnar, fer at spæla og eisini verður diskotek.

Umframt tónleikaliga undirhaldið verður eisini eitt meira eksotisk ískoyti.

Fyrireikararnir hava fingið Miss Lindu at vitja hendan vegin, og kvinnan, sum kemur úr Kanada, fer at dansa erotiskan dans á pallinum.

Tað fer ivaleyst at gera tað heitt í høllini, men tað plaga ikki at verða trupulleikar við at fáa kølt av í føroyska veðurlagnum

Tað er NSÍ, sum stendur fyri dansinum, og úr Runavík lova tey gott undirhald.

DANMARK
SKOTLAND
ÍSLAND

Aftur og fram, tá 2 ferðast saman, úr kr.

1.480,-

Ferðaavgjald kemur afturat prísinum.

Atlantic Airways

Vága Floghavn, FO-380 Sørvágur, Tel 333 900, Fax 333 990, e-mail: booking@atlanticairways.fo

SANSIR TEL 355 355